

# Evangeliið eftir Sigmundi

*Á triðja sinni varð tónleikaverkið »Jesus og makedonarin« eftir Sigmund Poulsen framført í Norðurlandahúsinum. Hesaferð í sambandi við 1000 ar eru liðin síðani Sigmundur Brestisson boðaði kristindómin í Føroyum*

*Theodor E. D. Olsen*
*Myndir: Jens Kr. Vang*

2. hvítusunnudag varð tónleikaverkið »Jesus og Makedonarin« eftir Paula í Sandagerði framført í Norðurlandahúsinum. Hetta var triðja útgávan av verkinum, sum bæði hevur verið á ferð í Skotlandi og Íslandi, men hesaferð varð tað framført av Føroya Symfoniorkestri. Tað vil siga at frá at hava verið ein rockmusical og m. a. innihildið improvisatión í tí fyrstu útgávuni frá 1984, var »Jesus og Makedonarin« hesaferð niðurskrivað út í odd og egg. Eisini er eitt sindur gjørt við tekstin hjá Sigmundi Poulsen, tí við í framførsluni vóru eisini útlendskir sangarar, so til bar at hoyra tann av teksthøvundanum uppfunna brúðleypsgestin í Kána, makedonaran, syngja á íslendskum, og annan av høvuðsprestunum og Judas syngja á svenskum. Bróðurparturin varð tó sungin á føroyskum, og ikki kann sigast annað at hetta norðurlendska pallsamstarvið riggaði sera væl.

Konsertin byrjaði annars við, at symfoniorkestrið spældi ta sonevndu Trúbótarsymfoniina eftir Felix Mendelsohn. Hesin fjórði satsurin, ið varð spældur, byrjaði við, at ein einsamøll floyta spældi bar fram fyrstu strofuna av sálminum Vár Guð er føst og haldgóð borg. Síðani sluppu hini ljóðførini so við og við inn í ljóðmyndina, og eftir mikið tónastríð spældu øll koralin.

Ein flott byrjan upp á sjálvt verkið hjá Paula og Sigmundi, ið sum sagt byrjar við tí tiltikna brúðleypinum í Kána, har Jesus ger eitt undur. Hann ger vatnið til perlandi vín. Eftir hetta verður hann tó meira trupul hjá yvirvøldini at fáast við. Hann verjir skøkjur og onnur á lægsta stigi í samfelagnum, og tað hóvar teimum í erva, eitt nú høvuðsprestunum, lítið. Teir gera av at taka hann av ræði, og so byrjar endin á hesi dramatisku søgu, sum inniheldur ivaleyst kendastu avrætting heimssøguni - hesaferð lýst í orðum Sigmundar og tónunum hjá Paula. Og hesaferð enntá eisini av einum symfoniorkestri mannað við eini rúgvu av fólki, men sum heild svingaði tað minst líka so væl, sum tann fyrsta útgávan úr áttatiárunum, ið sum nevnt kann kallast ein rockopera, og sum finst á vinyli. Nær Jesus og Makedonarin kemur út á fløgu vita vit her á redaktiónin ikki, men enn ein útgáva kundi verið hóskandi, nú ein nýggj versión er farin av bakkastokki. Í øllum førum bleiv hendan triðja útgávan av Jesusi og Makedonaranum væl fagnað av fólki. Útselt var, Útvarpið sendi konsertina beinleiðis út í hvønn krók í landinum, sum unnti sær sjálvum ta fragdina, og tað bleiv kanska eisini útvarpað, áðrenn tíðindini tóku yvir, hvussu væl nøgdar áhoyrarar Pauli fekk á hvítusunnu. Standandi lógvabrestirnir dundu í fleiri minuttir í Norðurlandahúsinum hendan dagin, og millum tey nógvu blómutyssini, sum vórðu handað kring Føroyaland, vóru hesi serliga uppiborin. Tí eins og himmiríki er í hjørtum okkara, sum Sigmund at enda í verkinum pompøst siterar Jesus, so slapp tónleikurin eisini innum løtu hjá okkum áhoyrarum eina løtu hesa hvítusunnuna.







# Útbyggja skúlan í Fuglafirði

*Gongst sum ætlað verður farið undir at byggja út skúlan í Fuglafirði komandi skúlaár. Nýggja fólkaskúlalógin skundar undir byggiætlanina hjá kommununi*

DÁNJAL HØJGAARD

Skúlin í Fuglafirði skal byggjast út. Stigvíst.

Fuglafjarðar kommuna hevur gjørt eina heildarætlan fyri útbyggingina. Eina ætlan, sum fevnir um tilsamans seks byggistig og røkkur kanska 10-15 ár fram í tíðina, upplýsir Fuglafjarðar Kommuna.

Í fyrstu atløgu hevur kommuna játtað eina millión til arbeiðið, so at skjøtul kann setast á í ár, upplýsir kommunan.

### Serstovur

Tað er nýggja fólkaskúlalógin, sum ger, at tørvur er á eini skúlaútbygging nú. Lógin setir krøv um sergreinaundirvísing, og brúk verður fyri serstovum, eitt nú til handaligar lærugreinir.

Kommunan hevur raðfest eina byggiætlan fyri skúlan. Fyrsta byggistigið, sum ætlanin er at fara undir í ár, verður í tveimum hæddum og verður tilsamans 426 fermetrar.

Ætlanin hjá kommununi fyri skúlan er umfatandi.

Útbyggingin fevnir um tilsamans góðar 2.500 fermetrar og umfatar m.a. eina hátíðar- og samkomuhøll. Gamli skúlin, sum varð bygdur á staðnum í 1936, skal takast niður.

Øll byggingin er mett at kosta góðar 50 milliónir krónur.

### Gomul ætlan

Ætlanir hava í mong ár verið at byggja afturat skúlanum í Fuglafirði.

Upprunaligi skúlin varð bygdur í 1936, og í seinnu helvt av 60-unum kom tann nýggi skúlin.

Einaferð varð tosað um at byggja framhaldsdeildini í Fuglafirði ein skúla á Kambsdali, men hendan ætlan er slept. Nú verður so bygt upp í skúlan í Fuglafirði í staðin.

Næmingar úr Leirvík og í Gøtunum báðum ganga í framhaldsdeildini í Fuglafirði.



*Súni í Hjøllum, skúlastjóri í Fuglafjarðar skúla frammanfyri økið, har ætlanin nú er at byggja ein vong upp í skúlan*
*Mynd: Dánjal Højgaard*


KATRIN® FØROYAR

Størv hjá **JB Trade** leys at søkja

**SØLA OG VØRUÚTKOYRING**

Vit sóknast eftir fólki, ið skal kunna arbeiða sjálvstøðugt, har stórsti parturin er søla. Sølan er tó tengd at øðrum meira bundnum uppgávum, so góð samstarvsevni bæði við starvsfelagar og viðskiftafólk eru neyðug. Starvið er spennandi og avbjóðandi, og fyri rætta fólkið kann væntast góð løn uttan loft. Neyðugt er at hava vanligt koyrikort. Vit vænta at tú ert røkin, álitandi, ágrýtin, kanst arbeiða málrætta og samstundis veita viðskiftafólki okkara eina fyrstafloks tænastu.

Verður at seta skjótast tilber, men bíða vit fegin eftir rætta fólkinum. Ert tú liðug/ur við skúlan nú í summar, skalt tú verða meir enn vælkomin at søkja.
Send skrivliga umsókn skjótast tilber.

**HEILSØLU-LÆRLINGUR**

Søkt verður eftir lærlingi til spennandi starv, ið umfatar alt tað, sum kann væntast á einari sølufyritøku í støðugari menning, við nógvum spennandi uppgávum fyri framman. Setan v.m. verður eftir galdandi sáttmálum. Starvið fevnir um arbeiði við sølu, goymslu, innkeyp, skrivstovu og kundavitjan.
Ert tú ágrýtin, røkin, fyrikomandi, hevur góð samstarvsevni og kundi hugsa tær eina framtíð innan sølu/tænastu er tað júst tær, vit sóknast eftir.

Starvið verður væntandi at byrja 07. aug. 2000.
Umsókn saman við avritum av prógvum, møguligum viðmælum og persónligari lýsing skal verða okkum í hendi í seinasta lagi mánadagin 03. juli 2000.

**FERIU-AVLOYSARI**

Vit mangla álitandi og fyrikomandi avloysara til skrivstovu okkara, í tíðarskeiðnum 19. juni - 21. juli 2000 (íalt 5. vikur).
Løn verður eftir nærri avtalu.
Arbeiðið umfatar eisini móttøku og avgreiðslu av bíleggingum og annars alt annað fyrifallandi arbeiði, ið er á sølufyritøku.
Av tí at vit ikki eru fullmannaði hetta tíðarskeiði, er neyðugt at kunna arbeiða sjálvstøðugt til tíðir.
Arbeiðsroyndir á økinum er eingin treyt.

Áhugað kunna senda okkum nakrar reglur á fax 315887, T-post: jb-trade@post.olivant.fo ella ringja til okkum á tel. 316887.
Vit frætta gjarna frá tær skjótast tilber.

*Vilt tú frætta nærri um størvini, kanst tú ringja til Beinir Kristiansen á tel. 316887 ella 216887*

***JB Trade** er heildarveitari innan reinføri og viðlíkahald til virkir og stovnar í Føroyum.*

*KATRIN: Boksir og pappír til øll endamál.*
*NOVADAN: Reinførisevnir og sóttreinsan til íðnaðin.*
*BUTCHER: Viðlíkahaldsevnir til gólv, úr USA.*
*DAN DRYER: Heitluftsturkarar til hendur og hár.*
*SYSTEM CLEANERS: Skúmanlegg og tilhoyr til virkir v.m.*
*VIKAN: Skøft, bustir, kustar v.m. til einhvønn tørv.*
*CC & CO: Limur í Euro Trade Group, alt til m.a. virkir, stovnar, skúlar, skrivstovur, bakarar, keypmenn, hotell og matstovur.*
*ULTIMATIC: Nýmótans boksir og serframleitt pappír.*
*D.I.T INTER: Vaskivognar og moppur og annað tilhoyr.*
*PRO-REN: Sóttreinsan til hendur innan matíðnaðin.*
*CLEAN TECH: Serlig tól til sóttreinsan av rúmum og tangum.*
*SÆKKO: Heildarveitarin innan røkt o.a. til serstovnar.*
*MANISTA: Serliga húðvinarligt hondreinsievni.*

*JB Trade er einaumboð hjá CC & Co í Føroyum og gevur hetta serligar fyrimunir viðvíkjandi prísi og vøruúrvali.*

**JB Trade** Spf. • Akranesgøta 3 • Postrúm 316 • 110 Tórshavn • Tel. 316887 • Fax 315887 • T-post: jb-trade@post.olivant.fo

Sosialurin - 311820